# Haraldsstova – har h



*Børnini úr Haraldsstovu framføra spennandi leikin fyri hinum børnunum í tiltakinum á Bókasavninum í Klaksvík. Tey sita sum á nálum og lurta eftir tí, sum hini framføra*

**15 børn úr Klaksvík hava sín dagliga "arbeiðsdag" í útibarnagarðinum í Haraldssundi. Har hugna tey sær inni og úti, og finna sjálvi uppá ymiskt at spæla við, m.a. ein sjónleik, tey framførdu fyri øðrum børnum í Klaksvík**

DAGRØKT
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Bárður Lydersen*

**Haraldssund:** Vit hava fingið at vita, at tað er ein útibarnagarður í Haraldssundi. Men tað er ikki bara sum at siga tað at finna hann.

Vit koyra tvørtur um byrgingina, og fáa tá eyga á eitt spælipláss. Barnagarðurin liggur helst tætt við tað, halda vit.

Men tað ger hann ikki, tí har er einki sum bendir á ein slíkan. Og har er heldur ikki eitt einasta barn at síggja.

Vit snara norðureftir í bygdini, men har eru bert sethús at síggja. So var kanska einki um tosið at ein útibarnagarður var í bygdini.

Uttan fyri bygdarhúsið síggja vit ein yngri mann. Vit steðga bilinum. Hann man vita, hvar útibarnagarðurin er.

– Útibarnagarðurin? Hann er beint her, inni í bygdarhúsinum. Og tað er eisini her at eg arbeiði, sigur Kim.

Vit steðga á og fara innar. Vit hava ikki meiri enn latið úthurðina upp, tá vit skilja at vit eru komin á rætta staðið.

Í salinum niðriundir hoppa børnini um eitt elastikk, og í erva hoyrist eisini ljóðið frá børnum, sum stuttleika sær.

Jú, vit eru komin á rætt stað - útibarnagarðin Haraldsstova í Haraldssundi, har eini 15 børn eru og har tey vanliga eru fýra starvsfólk.

## Slóðbróting

Tá ein á sinni byrjaði at tosa um at hava útibarnagarðar í Føroyum, vóru mong ið ivaðust um hetta fór at bera til her á landi.

Tey høvdu kanska nakað at hava hesa støðuna í, tí veðrið í Føroyum er nú ikki einaferð eins og veðrið í Danmark og øðrum londum, har slíkir barnagarðar longu finnast.

Men tey, sum høvdu hug at royna hesa ætlanina í verki, stríddust fyri henni, og stutt eftir lat fyrsti útibarnagarðurin upp.

Síðani tá eru slíkir útibarnagarðar vorðnir sera væl umtóktir, og fleiri kommunur hava valt at seta slíkar á stovn.

Tískil finnast teir í dag á mongum støðum kring landið - t.d. í Leirvík, Toftum, Æðuvík, Vestmanna, Hvítanesi, Trongisvági, Klaksvík, Runavík – og sjálvandi Haraldsstova í Haraldssundi.

## Bussflutningur

Hóast hesin útibarnagarðurin hevur heimstað í Haraldssundi, so gongur ikki eitt einasta barn úr bygdini í hesum barnagarði.

Øll 15 børnini eru nevniliga úr Klaksvík. Og orsøkin til at tey ikki eru í barnagarði í Klaksvík, men í Haraldssundi er hin einfalda, at einki høli er til teirra har.

Hinvegin so hava børnini úr Haraldssundi og úr Kunoy eisini møguleika at sleppa í henda útibarnagarðin. Men í løtuni eru so eingi børn hagani.

Haraldssund liggur jú eitt fitt petti frá sjálvari Klaksvíkini, men her er funnin ein heppin skipan, soleiðis at foreldrini ikki noyðast at koyra børnini fram og aftur tvær ferðir um dagin.

Ístaðin verða øll børnini savnað við Mylnuhúsið í Klaksvík á morgni. Tá klokkan fer at nærkast hálvgum tíggju gera tey klárt at fara við bussi til Haraldsstovu.



*Tær sita so fittar og leggja eitt puslispæl*